


# Risastórt hotellskip til Hetlands at hýsa oljuarbeiðarum

**Jan Müller**

08.03.2015 - 20:14

Oljan.fo

Hóast oljuvirksemið nógva staðni kring heimin er vorðið skert og avmarkað orsakað av oljuprísinum, so er grannin fyri sunnan, Hetland, framvegis sera virkin. Tær nógvu og stóru útbyggingarnar á Atlantsmótinum halda fram, tó at onkur teirra er vorðin útsett. Nógva arbeiðið, sum fer fram í Hetlandi í løtuni, setir stór krøv til innivist, og í vikuskiftinum kom eitt av heimsins størstu hotellskipum til Lerwick, har tað skal hýsa hundraðtals oljuarbeiðarum. Hetta skrivar Shetland Times. Talan er um fyrrverandi cruiseskipið *SNAV Toscana*. Her eru 500 seinkjarpláss og fer talið á arbeiðsfólki, sum eru knýtt at gassútbyggingini hjá Total og Dong, tá at koma upp á 2000. Trý onnur hotellskip

eru longu í Hetlandi umframt at øll gistingarhús í oyggjunum eru upptikin av oljufólki. Aftrat hesum koma fleiri húsabátar.

Hóast strongt verður á at fáa fyrstu gassframleiðsluna á Atlantsmótinum klára, so merkjast lækkandi oljuprísirnir eisini her um leiðir. BP hevur nevniliga gjørt av at útseta eina útbygging av tess gassútbúnaði í Sullom Voe fyri 5 mia. kr. í eitt hálvt ár. Stephanie Millar, talsmaður hjá BP sigur við Shetland Times, at tað framvegis er ætlanin hjá BP at menna framleiðsluna vestan fyri Hetland,so mest fæst upp úr undirgrundini á Atlantsmótinum, men oljuprísurin ger, at tað er neyðugt at endavenda útbyggingingarætlanunum, so kostnaðarurin fæst longur niður. Tað hevur eisini týdning at kunna fremja útbyggingar í betri veðri enn nú.

Í morgin kemur bretski ráðharrin fyri Skotland, Allistair Carmichael á vitjan í Føroyum. Hann er valdur í bretska parlamentið fyri liberala flokkin í Orknoyggjunum. Ráðharrin fer at vitja løgmann og landsstýrismenn og fer eisini at vitja fleiri føroyskar fyrittøkur, sum onkursvegna hava ella kunnu fáa samstarv við Skotland og oyggjarnar har.

